## Frem fekk eitt tennisegg

Frem tók ímóti SAS-ligafelagnum, FC Nordsjælland í donsku steypakappingini. Úrslitið varð eitt stórtap til liðið hjá Jón Róa Jacobsen og Atla Danielsen, Frem, sum fekk eitt veruligt tennisegg. FC Nordsjælland vann heili 6-0, aftaná hálvleiksstøðuna 5-0. Bajram Fetai skoraði tvey mál, Henrik Kildentoft, Andreas Dahl, Nicklas Pedersen og Christian Nielsen skoraðu hvør sítt mál. Munurin millum eitt botnlið í næstbestu donsku deildini, og eitt væl koyrandi SAS-liga lið varð eyðsýndur, serliga í 1. hálvleiki.



## Defoe søkti Tottenham

Fyri 10 mánaðum síðani seldi Tottenham álopsspælaran Jermaine Defoe til Portsmouth. Sunnudagin spældu júst hesi feløgini ímóti hvørjum øðrum. Portsmouth vann 2-0, og Deofe gjørdi annað málið. Hetta var fimta málið hjá Defoe í hesum kappingarárinum, og hann er toppskjútti í Premier League. Defoe hevur skotið fleiri mál enn alt Tottenham-liðið tilsamans higartil.



*Tá Høgni Zachariasen stútaði í netið beint fyri steðgin, var gullkósin løgd hjá EB/Streymi. Tað eydnaðist tó ikki at spæla gullið heim í Runavík, men javnleikurin hevur sett EB/Streym á sjálva gáttina til gullið*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

# fet eftir

um málinum, sum nógv varð tosað og skeldast um.

Sunnudagin gjørdist EB/Streymur ikki meistari. Men málið, sum Høgni Zachariassen skoraði eftir 94 minutttum í dystinum við Løkin var eitt av teimum heilt týdningarmiklu. Og óhepni leikluturin hjá Tórða Thomsen í NSÍ-málinum júst hesa løtuna verður uttan iva eisini hangandi eftir í minninum hjá áskoðarunum.

### Móti himmiríki

Men undan hesum høvdu áskoðararnir verið vitni til ein dyst, har liðini veruliga prógvaðu, at tey eiga at roknast millum absolutt bestu liðini í landinum.

Fjøldin, sum var komin at stuðla, stóð ikki petti aftan fyri hana, sum fyri einum ári síðani bar NSÍ seinasta pettið móti gullinum, og væl stuðlaðir av hesum royndi EB/Streymur alt fyri eitt at taka stóra fetið fram móti gullinum. Tí karmarnir kundu væl neyvan finnast betri, nú talan var um dyst móti verandi meistarunum.

Men tað var nú eisini skjótt, at NSÍ svaraði aftur. Við einum varnum útgangsstøði, har umstillingarspælið tó gekk við fúkandi ferð, soleiðis at tríggir av miðvallarunum gjørdust tríkvart áleyparar, eydnaðist tað fleiri ferðir at spæla seg upp í borðunum. Og einar tríggjar ferðir var eisini heilt nær við. Men tvær ferðir fantom-bjargaði René Tórgarð royndum frá Karoly Potemkin, og eina ferð skeyt ungverjin uppum í góðari støðu.

Og beint fyri steðgin eydnaðist so EB/Streymi at leggja seg á odda. Júst innskifti Høgni Zachariassen var hægstur upp til hornaspark, og so kundu teir á oddaliðnum fara til hálvleikskaffi vitandi um, at meistaraheitið "bara" skuldi koyrast heim í trý korter afturat.

### Potemkin í essinum

Um tað var vitanin um hetta, sum tyngdi spælararnar, er ilt at vita. Men í øllum førum var EB/Streymur meira enn bara vanliga trilvandi, tá seinni hálvleikur byrjaði.

Og tað dugdu runavíkingar og serliga Karoly Potemkin at gera sær dælt av. Potemkin varð ikki mettur sum nóg góður til hópin hjá EB/Streymi, og eins og hann gjørdi tað í steypafinaluni – tá spældi hann við B36 móti EB/Streymi – so nýtti hann dagin til at senda eina áminning til felagsliðið.

Fyrst varð Potemkin sendir avstað av Boga Løkin, áðrenn hann javnaði leiðsluna hjá NSÍ, og fagnaðurin var ovurstórur, tá hann lítla løtu seinni stóð á rætta staðnum í bankaði bóltin í meskarnar til heimaleiðslu. Og so var áminningin í fagnaðinum ikki til at fara skeivur av.

### Trý skot til bjørnina

Við leiðsluni var EB/Streymur nú aftur tvey stig frá meistaraheitinum, og tað vóru framvegis trý onnur lið, sum í teoriini høvdu møguleika at koma fram um í gullstríðnum.

Og tað bendi eisini alt tann vegin. Seinastu løtuna royndu gestirnir at flyta nógv fólk fram, og hópin av innleggum spurdust eisini burturúr. Men fram til fýra av teimum fimm minuttunum, sum dómarin hevði lagt afturat, vóru farnir, var hetta úrslitaleyst.

Men so var tað, at EB/Streyma-fjøldin varð lyft uppfrá. Støðan var annars ikki serliga nógv meira vandamikil, enn hon var fleiri aðrar ferðir í dystinum. Høgni Zachariassen, sum júst hevði sæð Tórð Thomsen stórbjargað roynd út til hornaspark, lyfti inn í fimm-meturin, og onkursvegna fór bólturin millum hendurnar á NSÍ-málverjanum, ið mest sum vantrúgvin kundi hyggja at, meðan kúlan hoppaði inn í meskarnar.

Málið gjørdi ikki EB/Streym til meistarar. Men fagnaðurin var ovurstórur. Einsamalla stigið ber við sær, at NSÍ nú er definitivt úti av FM-dystinum í 2008, og hjá EB/Streymi restar nú bara eitt stig í. Tað kann vera, at gummibeinini framvegis gera um seg, men við trimum skotum eftir í byrsuni skal vilja mest sum ófatuliga illa til, um bjørnin ikki verður skotin hesaferð!

## Nøgdur og ikki



Karoly Potemkin fekk við sínum báðum málum víst fyrrverandi felag sínum, at hann væl er maður fyri at finna fram til meskarnar. Men hóast hetta, so var hann ikki heilt nøgdur um dystin sunnudagin.

- Vit missa jú stig í evstu løtu, og tað kann eg ikki vera nøgdur um. Og tað er ikki fyrsta ferðin, at hetta hendir hjá okkum í ár.

- Og vit kunnu sum so bara takka okkum sjálvum fyri, at vit ikki í størri mun hava fylgt við EB/Streymi. Einar tríggjar-fýra ferðir í ár hava vit havt møguleikan at sleppa upp í gulldystin aftur, men hvørja ferð hava vit kiksað. So vit hava bara okkum sjálvum at takka, at vit ikki eru nærri gullinum enn tað sama, segði Karoly Potemkin eftir dystin.

**-mørk**

## Ein góð kensla



Høgni Zachariasen hevur fyri tað mesta verið á skaðalistanum hjá EB/Streymi. Tíðliga í ár breyt hann beinið, og tí var fagnaðurin skilliga stórur, tá hann í tveimum umførum sendi bóltin í NSÍ-málið.

- Tað er stuttligt at vera við aftur, og tá tað so er upp á hendan mátan, er tað næstan meira, enn mann kann ynskja sær. Men nú havi eg hvílt meg í tríggjar mánaðir, so tað er kanska tíð uppá, at eg komi ígongd, segði Høgni Zachariassen, tá vit tosaðu við hann eftir dystin.

Og nú eru tit bara eitt stig frá gullinum. Kemur tað til høldar, tá tit spæla móti B36 næstu ferð?

- Tað vil eg hopa. Men tað var eisini sera nær við hjá EB/Streymi fyri tveimum árum síðani, so eg haldi, at vit allir royna at hava beinini væl og virðiliga á jørðini. Og so mugu vit vóna, at vit eru nóg professionellir til at koyra tað heim á heimavølli, sigur Høgni Zachariassen.

**-mørk**